# Atlantsflog økir um farmaflúgvingina

**Ein eyka fráferð um vikuna er sett á skránna, umframt at meira pláss er sett av til farm. Serstakliga sersendingar**

FLOGFERÐSLA
*Jákup Mørk*

Hesum hevur Atlantic Airways boðað frá í tíðindaskrivi. Longu mikudagin verður túratalið hækkað, soleiðis at fráferðirnar nú eru 18 í tali hvørja viku - í lágárstíð væl at merkja.

Samstundis verður meiri pláss sett av til farma- og postflutning mikudagar, hós- og fríggjadagar, tá eftirspurningur er størstur.

Eitt nú fyritøkur, tengdar at skiparakstri, hava stóran tørv á at fáa rúmd fyri sersendingum, ið hasta og tí fer Atlantsflog eisini at menna tænastuna við prioritetsfrakt, so rúm verður fyri slíkari á øllum fráferðum, eins og starvsfólk hjá felagnum í Kastrup skulu fylgja við, at slíkar sendingar verða fluttar skjótast gjørligt.

- Við hesum tiltøkum hava vit tikið nøkur stig á leiðini til tess at menna loftvegis farmaflutningin til og frá Føroyum, sigur Magni Arge, stjóri.

### Javnvág má finnast

Hann sigur víðari, at tey í felagnum vóna, at økta túratalið fer at skapa enn betri kor fyri flutningi av bæði farmi og ferðafólkum.

- Tað ræður altíð um at finna eina javnvág í hesum. Koyra vit heilt optimalt, so skuldi hendan eyka fráferðin kanska ikki komið nú. Men so kundu vit havt eina støðu, har tvit til tíðir ikki megna at taka toppin av trýstinum. Tí hava vit valt, at økja nakað um kapasitetin, og so mugu vit vóna, at hetta í longdini er ein røtt avgerð, sigur hann.

Magni Arge leggur tó dent á, at enn kann talan verða um menning á farmaflutningsøkinum.

- Tað er ikki rokkið á mál, fyrr enn vit eisini hava fingið gongd á flúgving við farmaflogførum. Teirri ætlanini arbeiða vit støðugt við. Men tað krevur fyrst og fremst, at vit megna at fylla vørur í flogfarið bæði til og úr Føroyum, og enn eru vit ikki komnir heilt á mál við hesum, sigur hann.




*Talið av fráferðum úr Føroyum hjá Atlatnic Airways kemur nú upp á 18 um vikuna*

# Almannastovan styrkir almennu kunningina

**Almannastovan hevur gjørt nýtt kunningarrit, sum í hesum døgum verður sent til øll húsarhald í Føroyum. Samstundis verður heimasíðan hjá Almannastovuni enn sterkari miðil í almennu kunningini**

ALMANNASTOVAN
*tíðindaskriv*

Í tíðindaskrivi staðfestir Almannastovan, at kunningarritið er liður í arbeiðinum hjá stovninum at kunna almenningin um rættindi og veitingar sambært almannalóggávuni.

Í kunningarritinum verður í stuttum greitt frá teimum veitingum, sum til ber at søkja frá Almannastovuni. Greitt verður frá sjúkradagpeningaskipanini, veitingum sambært forsorgarlógini, almannapensjónum umframt øðrum sosialum skipanum. Eisini verður greitt frá mannagongdum í sambandi við umsókn, um kærumøguleikar v.m.

Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni, sigur, at kunningarritið, sum nú er gjørt, er týðandi liður í miðvísari ætlan at styrkja almennu kunningina og vegleiðingina hjá Almannastovuni sum heild.

-Almannastovan og tær tænastur, sum stovnurin umsitur, skulu gerast sjónligari. Tí verður í framtíðini eisini størri dentur lagdur á at brúka heimasíðuna sum miðil til almenna kunning sum heild, sigur Petra Johnsdóttir Joensen.

Kunningarritið verður sent øllum húsarhaldum í Føroyum, og verður eisini til taks á ymsum almennum støðum eitt nú á bókasøvnum, hjá kommunulæknum og ALS umframt á heimasíðuni hjá Almannastovuni.

